# Eitt gott arbeiðspláss

**– Onkur av arbeiðsmonnunum hevur verið her í skjótt 50 ár, og nakrir hava arbeitt hjá okkum í góð 30 ár. Hetta taki eg sum eitt tekin um, at teir trívast, sigur Einar Waag, sum er stjóri á Føroya Bjór**

FØROYA BJÓR
*Ragnhild Ellingsgaard*


*Einar Waag, dagligur leiðari á Føroya Bjór*

**Klaksvík, Sosialurin:** Á vegginum inni á kontórinum hongur ein stórur málningur av Havnini. Hesin var ein føðingardagsgáva frá Tórshavnar Býráð, tá virkið fyri nøkrum árum síðani fylti 100 ár.

Annars standa øl av ymsum sløgum frammi, og á borðinum hava nakrar Jolly eisini fingið teirra pláss.

Á sofuni situr Einar Waag, sum er stjóri á størsta bryggjarínum í landinum. Og tað er júst Einar, vit skulu tosa við í dag.

### Fylgja við

– Vit hava tað gott, sigur Einar, tá hann verður spurdur, hvussu tað gongur fyri tíðina.

– Fólk hava meir pening millum hendirnar í dag, enn tey høvdu fyri nøkrum árum síðani, og tað merkist aftur hjá okkum. Til dømis var árið í fjør betri, enn vit høvdu væntað, og framgongdin gjørdist størri enn vøksturin í nýtsluni, greiðir hann frá.

– Hetta merkist eisini aftur hjá arbeiðsfólkunum á staðnum, og vit hava altíð roynt at betra um arbeiðsumstøðurnar við at fylgja tí nýggjastu tøknifrøðini. Fyri at lætta um arbeiðið á virkinum hava vit fingið sum mest av sjálvvirknari útgerð inn, og hetta eru menn eisini sera fegnir um.

Arbeiðið á virkinum hjá Føroya Bjór kann annars tykjast øgiliga einstáttað, tá tað í høvuðsheitinum mest snýr seg um at hava eftirlit við fløskum, ið fara eftir einum samlibandi.

– Men hetta hava vit eisini broytt. Vit eru farnir undir eitt, ið vit kalla jobrotatión, so menninir skifta arbeiði alla tíðina. Hetta avmarkar so eisini tíðina á teim mest einstáttaðu plássunum, sigur Einar.

### Trívast væl

Tær góðu arbeiðsumstøðurnar vísa seg eisini aftur í úskiftingini av arbeiðsmegi. Einar fortelur um onkran mannin, sum hevur arbeitt hjá Føroya Bjór í skjótt 50 ár. Onkur annar hevur verið á staðnum í yvir 30 ár, og fleiri hava hildið fast við arbeiðsplássið í meir enn 15 ár.

– Hetta taki eg sum eina staðfesting av, at teir trívast hjá okkum. Útskiftingin seinastu tíðina hevur verið rættiliga lítil; sjálvandi er onkur farin, men nakrir venda aftur til okkara, eftir at hava verið burtur eina tíð, sigur hann.

Sum flest onnur virki skipar Føroya Bjór eisini fyri ymsum tiltøkum fyri starvsfólkunum. Her kunnu millum annað nevnast jólafrokostur, tunnusláttur og onkur útferð hevur eisini verið á skránni.

Men sum nakað heilt nýtt hevur leiðslan eisini skipað fyri einum skeiði í reingerðing og reinføri í matvøruídnaðinum. Hetta dámdu arbeiðsfólkunum bara heilt væl.

– Í Danmark sleppur tú ikki so frægt sum at standa í einum pylsuvogni, um tú ikki hevur eitt 3-daga skeið í reinføri, men í Føroyum finst eingin lógaráseting fyri hesum. Tó halda vit tað vera uppá sítt pláss at kunna um hesi viðurskifti, og tí ætla vit eisini at skipa fyri onkrum líknandi skeiði aftur, fortelur Einar.

### Gott við kapping

Í seinastuni hevur nógv verið at sæð til Restorff`s, hitt føroyska bryggaríið, í teim føroysku fjølmiðlunum. Restorff`s skifti á nýggjárinum eigarar, og hesir leggja stóran dent á marknaðarføring millum fólki.

Men Einar heldur ikki, at hetta nýtist at hava nakra keðiliga ávirkan á Føroya Bjór.

– Nei, als ikki. Tað er altíð gott við kapping, tí kappingin mennir jú okkum sjálvar, sigur hann.

– Kapping ger, at vit í enn størri mun mugu royna at halda fast í tí betra kvalitetinum, og tað er jú bara gott, greiðir Einar frá.

Framtíðarætlaninar hjá Føroya Bjór spenna annars víða. Men høvuðsendamálið er framhaldandi at liggja frammaliga á marknaðinum og framhaldandi at framleiða eina góða vøru.

– Men ikki minst skal Føroya Bjór verða eitt attraktivt arbeiðspláss millum fólk, sigur Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór, at enda.

# Ølkuskarnir hjá Føroya Bjór

**Flest allir norðingar kenna teir báðar ølkuskarnar hjá Føroya Bjór. Í fleiri ár hava teir koyrt sodavatn og øl út til kundarnar, og øll árini hava teir verið líka blíðir og týðir**

FØROYA BJÓR
*Ragnhild Ellingsgaard*


*Kristjan Suni og Sonhard, ølkuskarnir hjá Føroya Bjór*

**Klaksvík, Sosialurin:** Teir hava altíð onkra skemtiliga viðmerking, og ein kann ikki lata vera við at smílast, tá teir vísa seg. Teir eru rokaligir, men sjáldsama fittir. Teir eru tað, sum á føroyskum eitur »vognstýrari á ølvogni«, á gomlum donskum eisini nevnt ølkusk.

### Hava tíð til kundan

Sonhard Johannesen og Kristjan Suni Høgnesen hava í fleiri ár sitið aftan róðrið í stóra bilinum hjá Føroya Bjór. Teirra uppgáva er at fáa alla vøruna út til kundarnar, og hetta er júst nakað fyri teir.

Teir koyra út til allar handlarnar í Klaksvík, og hvønn mikudag vitja teir harumframt eisini í Árnafirði, Hvannasundi, Norðdepli og á Viðareiði.

– Vit hitta ótrúliga nógv fólk gjøgnum arbeiðið, og tað er jú altíð spennandi, sigur Kristjan Suni.

Og tað er heilt víst, nógv kenna eisini teir báðar. Teir eru kendir fyri altíð at vera skemtiligir og serstakliga hittinorðaðir.

– Jamen, tað er tá klárt. Ein skal altíð hava tíð til kundan, og vit fáa sum oftast okkurt hugnaligt prát við á vegnum. Vit práta um alt millum himmal og jørð, men serliga fótbólturin fer ofta við nógvari tíð, fortelur Sonhard.


*Arbeiðsdagurin hjá ølskuskunum gongur fyri seg inni í stóra bilinum hjá Føroya Bjór*

### Arbeiða saman

Teir hava sitið saman í bilinum í fleiri ár, og teir trívast báðir líka væl.

– Hetta er eitt serstakliga gott arbeiðspláss, tí her er altíð nokk at gera. Tí kenna vit okkum eisini tryggar her, greiðir Sonhard frá.

– Og vit ætla okkum eisini at vera her leingi afturat. Líka til vit skulu pensionerast, leggur Kristjan Suni afturat.

Og so kemur skálkurin fram í Sonhardi.

– Ja, men nú hava vit eisini verið her so leingi, at vit nokk ikki kunnu brúkast til nakað annað, skemtar hann á vegnum yvir til bilin. Páskini nærkast, og fólk skulu hava teirra til høgtíðina, so teir báðir skunda sær aftur til arbeiðis.



MRCC-venjing:

# Ein pólskur trolari í havsneyð

**MRCC-støðin í Tórshavn brynjar seg til at fara ígongd við virksemið hjá sær 1. apríl. Mikudagin var ein venjing á skránni. Ein pólskur trolari var komin í havsneyð, og øll segl vórðu sett til**

BJARGING
*Heri á Rógvi*


*Nógv eru boðini, sum koma inn til MRCC, og teir mugu gera nógv fyri at halda skil á øllum.*

Hurðin skuldi latast upp innanifrá. Beinanvegin fekst tú eina kenslu av, at her skuldi trygdin metast høgt á gomlu telegrafstøðini. Eftir einari gongd stóðu nøkur fólk. Við endan av gongini var eitt rúm til høgru, sum skuldi vísa seg at vera hjartað í operatiónini. Ein operatión, sum snýr seg um bjarging og MRCC.

Talan var um eitt stórt ljóst rúm, sum í veruleikanum er tvey rúm; býtt í tvey av einum stórum glas veggi. Á vegginum í rúminum vóru ymsar talvur. Ein talgild og aðrar vanligar talvur, har skrivað má við penni. Á talvunum standa allir teir upplýsingar, ið tørvur er á, meðan bjargingin fer fram. Tað eru nógv ting og nógv fólk, ið skulu virka saman og virka væl.

Tað er nevniliga vorðin tíð til at royna Sjóbjargingarstøðina MRCC. Ein pólskur trolari er komin í havsneyð í Nólsoyarfirði, og nú skal alt bara rigga. Tveir bretar halda eyguni við luttakarunum, men leiðslan og manningin er føroysk ella úr Føroyum. Løgreglan, MRCC, Færøernes Kommando eru bert nakrir av teimum stovnunum, sum skulu í gongd, og tað er nógv at gera. Øll hava sína uppgávu. Bretarnir báðir eru væl nøgdir við framstigini hjá føroysku bjargingarfólkunum, men fleiri framstig skulu enn gerast. Nógv er at taka sær av. Skúlagarðurin í Nólsoy skal m.a. ruddast, soleiðis at tyrlan kann lenda har.

Djóni Weihe leiðari fyri MRCC hyggur at, og hann letur væl at. Alt skal venjast, og so skal eftirmeting gerast aftaná.


*Fyri at gera venjingina so veruliga sum gjørligt, so ringja fólk inn við boðum ymsastaðni frá, men talan er í hesum førinum bert um sjónleik.*


*Bæði løgreglan og Færøernes Kommando skuldu í sving henda dagin venjingin var.*

# Detta aftur í fýrsini

**–um vit ikki halda fullveldiskósina, segði Høgni Hoydal m.a., tá Tjóðveldisflokkurin helt floksting um vikuskiftið**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Tjóðveldisflokkurin hevði um vikuskiftið floksting heima á Sandi. Luttøkan var rættiliga teir báðar dagarnar, ið flokstingið vardi. Formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, fegnast um stóru luttøkuna á flokstinginum, og hann heldur, at flokkurin ongantíð hevur verið betri fyri.

–Hetta flokstingið var sjálvsagt rættiliga nógv merkt av, at eitt valstríð stendur fyri durum, sigur Høgni Hoydal.

Flokkurin hevur m.a. tríggjar faldarar, ið viðgera ymisk traðrir í politikki Tjóðveldisfloksins við atliti at teimum seinatu fýra árunum.

Sum vera mann, so helt Høgni Hoydal eisini sína formansfrágreiðing.

Hann legði dent á, at einasta forðingin fyri einum frælsum Føroyum liggur í okkara egnu politisku skipan, har flokkar ikki megna at halda seg til tey mál, sum eru sett. Síðani fólkaatkvøðan varð avlýst fyri ári síðani, hevur tað verið ómetaliga trupult at halda stev. Um ikki uppskotið til sjálvstýri Føroya fólks hevði verið samtykt júst tá, so hevði neyvan borið til at framt tey stóru stigini, sum kortini eru tikin.

Høgni Hoydal segði, at gongdin í tinginum seinastu dagarnar vísir, hvussu skjótt vit kunnu detta aftur í fýrsini, um vit ikki halda fullveldiskósina.

Hann sló fast, at komandi løgtingsval er eitt lagnuval. Antin halda vit fram á frælsiskósini ella detta vit aftur í heimastýrisóskilið, sum kostaði øllum føroyingum vælferð og mundi gjørt av við okkum sum tjóð. Tjóðveldisflokkurin má tí gerast so sterkur á løgtingvsalinum 30. apríl, at ikki slepst uttanum hann í eini komandi samgongu. Og tí setur Tjóðveldisflokkurin øll segl til í valstríðnum.

### Vil hava Javnaðarflokkin við

Høgni Hoydal sigur, at Tjóðveldisflokkurin fegin vil aftur í samgongu, og ynski eru um at fáa bæði Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin við í eina samgongu.

Høgni Hoydal sigur seg ásanna, at tað ikki er so gott samband millum Tjóðveldis- og Sambandsflokkin, og tað verður ikki samgonga millum hesa báðar flokkarnar.

Tjóðveldisflokkurin samtyki eisini á flokstinginum einum yvirlýsing, sum staðfestir gongdina á sjálvstýrisleið, og hendan gongdin verður hildin at vera altavgerandi.

## Føroya Sparikassi nærri at gerast partafelag

*Tíðindaskriv*

Føroya Sparikassi hevði umboðsráðsfund seinasta leygardag, 16. mars 2002. Á skránni vóru m.a. uppskot til viðtøkur fyri Føroya Sparikassa P/F og Sparikassagrunnin, sum skal stovnast í sambandi við umleggingina til partafelag.

Ætlanin fyri umleggingina til partafelag er í stuttum hendan:

Á aðalfundi 5. apríl 2002 verður uppskot lagt fram um at leggja Føroya Sparikassa um til partafelag við virknaði frá 1. januar í 2002.

Sparikassagrunnurin kemur eftir umleggingina at eiga góð 96% av partapeninginum í Føroya Sparikassa P/F, sum hann ognar sær við at keypa góðar 639 mió. kr. til kurs 125.

Ábyrgdararnir fáa hinvegin høvi at umleggja ábyrgdarfæið til partapening til kurs 100, og hartil at tekna upp til 4 ferðir ábyrgdarfæið í nýggjum partapeningi til kurs 100.

Samanlagt kunnu ábyrgdararnir tekna upp til 25 mió. kr. í partapeningi. Tá er umlagda ábyrgdarfæið íroknað. Við yvirtekning verða tekningarynskini lækkað soleiðis, at flest møgulig sleppa at tekna partapening.

Umframt Sparikassagrunnin verða tað einans ábyrgdarar, ið fáa høvi at ognast partapening í Føroya Sparikassa P/F.

Møguleiki er at tekna seg sum ábyrgdara fram til fríggjadagin 5. apríl 2002, kl. 16.

Stórur áhugi er í løtuni fyri at tekna seg sum ábyrgdara. Talið av ábyrgdarum er nú komið upp á 6.356 og ábyrgdarfæið uppá 12,4 mió. kr